# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Óluva Jensen, Skopun:

## 30 ára starvsdag sum heimahjálpari

Í dag 10. mars verður móttøka á ellisheiminum Norðuri á Skeri í Skopun í sambandi við at Óluva Jensen í Skopun hevur arbeitt 30 ár sum heimahjálpari.

Hesi 30 árini, Óluva hevur arbeitt sum heimahjálp, hevur hon tikið sær sera væl av temum gomlu bæði í og uttan fyri arbeiðstíð. Hon hevur ofrað seg fyri tey, ið hava hjálp fyri neyðini. Samstundis hevur hon fingið nógvar vinir fyri lívið í sínum til tíðir strævna og krevjandi arbeiði.

Hon hevur verið í skúlanevndini í Skopun og í skúlastýrinum fyri Megin-skúlan. Hon er eisini virkin limur í Sandoyar Javnaðarfelag. Í mong ár var hon sunnudagsskúlalærari í Betania í Skopun.

Óluva er sera arbeiðssom og er ófør at kokkast og at gera mat til t.d. ervi, brúdleyp og veitslur. Hon er ein av teimum trúføstu, sum altíð minnist til síni nærmastu og er altíð klár við eini hjálpandi hond uttan á nakran hátt at



seta seg sjálva í miðdepulin.

Óluva er født og uppvaksin í Skopun. Dóttir Jacob Eli og Jóhannu Hansen, hon er elst av sjey systkjum. Hini systkini eru Jancy, ið býr á Toftum, Elisabeth í Skálavík, Eisinberg í Skopun, Óla Christian á Toftum, Símin í Havn og Eyðvør í Húsavík.

Hon er gift við Peturi Jensen úr Skopun, tey fingu trý børn, Leinu, Jákup Eli og Marjun. Leina andaðist í 1977 bert 10 ára gomul. Óluva eigur eisini trý ommubørn, sum hon tekur sær nógv av.

*- red*

## Minningarorð um Elwyn Griffiths

**Tað tynnist út millum bretsku hermenninar, sum bardust fyri frælsa heimin. Nú er enn ein av teimum farin, sum forðaðu fyri, at Nazitýskland vann á land her og trælabant okkum í tí ræðslustýri, sum teir útyntu í at kalla øllum Europa, fra Sicilia til Nordkap og frá Normandínum til Stalingrad**

Tað var mánadagin tann 4. mars 2009 at Elwyn Griffiths andaðist í Walisiska býnum Wrexham 92 ára gamal, har hann búði mesta av ævi síni saman við føroysku konu síni Ragnu, dóttir Gudmund og Ragnu Isfeld. Tey fingu tvey børn, Marion og Malcolm.

Elwyn var sera fryntligur og vinsælur maður, sum dámdi væl at siga frá søgum, og ikki minnst frá tíðini hann var hermaður í Føroyum. Tað var týðuligt, at tíðin hjá honum sum hermaður her hevði havt stóra ávirkan á hann.

Eisini var hann ein góður og kærleiksfullur ektamaður, tað merktist hvussu góður hann var við Ragnu – konuna, og altíð var hann so umhugsin og vildi henni alt tað besta og syrgdi hann altíð fyri, at hon kundi koma til Føroya at ferðast.

Vit vóru fleiri ferðir og vitjaðu tey og nutu stóran blíðskap og var Elwin um okkum, og gekk túrar við okkum í grannalagnum, har hann vísti okkum hvussu kolaminuøki blivu plantað til vakrar parkir.

Tað kann tykjast at verða einsamalt hjá ungari føroyskari gentu at flyta til so fremmant umhvørvi, men her hevði hon góðan stuðul í systrini Ingrid, sum eisini giftist við bretskum hermanni og býr í Nottingham.

Elvyn kom til landið í 1942 saman við nógvum øðrum hermonnum á troppaskipi íð legði at í Sørvági.

Hann var í Royal Artillery Regiment og í Vágunum passaði hann luftverjukanónirnar, og var har í umleið 2 ár og var síðani fluttur til Søldafjarðar, har hann kom at passa tær stóru kanónirnar, sum skuldu verja krígsskipini á Skálafjørðinum, sum tá var herflotahavn hjá bretum.

Tað var her í Søldafirði hann kom at møta Ragnu, sum var uppfostrað her hjá Petur Weyhe keypmanni.

Sum omanfyri frásagt, so dámdi Elwyn at siga frá hendingunum, sum hann hevði verið úti fyri í Føroyum sum hermaður, og haldi eg, at henda søgan er bæði humoristisk, alvorlig og fitt – Elwyn sigur frá:

Teir løgdu til bryggju í Sørvági og umborð á skipinum vóru útyvir soldatar eisini 3000 sokallaðir "pioners", tað vóru menn, sum ikki kundu brúkast í herinum, herflotanum ella luftvápninum, so teir blivu settir á land her at gera flogvøllin, og hann skuldi gerast liðugur og verða flúgviklárur innan eitt ár og sum Elwyn segði, máttu teir arbeiða allar dagar sjálvt í stormi, kava og regni, men teir náddu málinum.

Ofta tóku hermennirnir synd í "pionerunum" sum teir stríddust í øllum veðri.

Elwyn sigur víðari frá, at tá teir eru komnir á land, vistu teir ikki hvar teir vóru, tí teir høvdu ikki fingið at vita hvar teir skuldu, so teir gittu at teir vóru antin í Noreg ella Íslandi.

Teir stóðu á kajini og bíðaðu eftir, at vápnini og annað viðføri skuldu koma uppá land. Meðan teir soleiðis standa vápnaleysir og bíða, kemur ein riðil av uppøstum monnum, vápnaðir við spjótum og knívum rennandi móti teimum, og nú vóru góð ráð dýr, tí teir høvdu jú ongin vápn uppi á sær – teir mæla tá hvør við annan: "They dont like us here"-

Men hvat hendir- teir uppøstu menninir renna framvið hermonnunum og í bátarnar.

Tað var grindaboð – gott at hermenninir ongi vápn høvdu uppiá sær, tí so kundi mikil orrusta staðist á kajini.

Við hesum heldur skemtiligu og fittu hending fari eg at lýsa frið yvir Elwyn Griffiths, mín kæra svág.

**Albert Isfeld**

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Ellinor Udbø Jensen,** ættað úr Tórshavn, búsitandi í Ledøje, andaðist hósdagin, 83 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Gladsaxe kirkju fríggjadagin 13. mars kl. 11.

**Kristina Weihe**, vanliga nevnd Nina, fødd Jensen, fer til gravar úr Adventistakirkjuni týsdagin kl. 13.

**Jona Joensen, Klaksvík,** dóttir Onnu Mariu og Rógva Joensen, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum leygardagin, 20 ára gomul.

**Johan K. Joensen**, fyrrverandi sparikassastjóri, Tórshavn, ættaður úr Miðvági, andaðist fríggjadagin, 92 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum týskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Dómkirkjuni mikudagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Johan, kunnu lata Leguhúsinum í Nesvík eina peningagávu.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá ið elskaða mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Pouline Katrine Nolsøe Hansen**
Tórshavn

doyði og varð jarðað.
Takk fyri alla hjálp, og tøkk fyri sýnda samkenslu,
bæði øll tit, sum ringdu og tit mongu, sum fylgdu
mammu til hennara seinasta hvíldarstað.
Stóra tøkk til Hera Joensen, prest, fyri hjálpsemi og
góð og troystarrík orð.

*Familjunnar vegna*
**Bjørg, Synnøva, Haldis og Gunnvør**

**Dagurin**
**10. mars. Eðla**. Einki halgimenni er við hesum navni, men sipað verður kanska til enska abbadissu Sanktu Etelredu, sum doyði 10. mars í 626. Helst týska navnið Adelheid, ið merkir hin ediliga.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

**85 ára føðingardagur**
Í dag 10. mars, fyllir Anna K. Vang, Kaldbak, 85 ár. Dagurin verður hildin á Lágargarði frá kl. 16-19

**Brúdleyp**
25. apríl 2009 kl. 12 giftast í Betesda, Klaksvík: Elsebeth P. Eyðunsdóttir Jacobsen, Svínoy og Marni Steinberg, Klaksvík. Veitslan verður á hotel Norð kl. 16. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tekna seg á tlf. 226916 (Elsebeth) ella tlf. 220061/ 287307 (Marni) innan 31. mars 2009.